# 1001 Natt

**Høvundur** (***Arabian Nights***): Dominic Cook.
Umsett til norskt ”1001 Natt”: Irene Lecomte.

**Leiksøga**: Leikurin gongur fyri seg á slottinum hjá Shahrayars Kongi. Kongur elskar konu sína sum síni egnu eygu. Tá drotningin svíkir hann, verður kongur so særdur, at hann forbannar alla verðina, alt lívið og allar kvinnur. Kona hansara verður dripin, og kongur svørð, at hvønn dag skal hann gifta seg við einari jomfrú, og morgunin eftir skal hon verða dripin.

Nógvar ungar gentur mugu bøta við lívi sínum.

Aftur í kvøld er brúdleypsnátt á slottinum hjá Shahrayar kongi. Morgunin eftir skal tann nýggja drotningin ‚Sheherazade, lata lív sum túsund ungar brúðrar áðrenn hon. Men kanska er tað eitt, sum kann bjarga henni – Sheherazade dugir at fortelja søgur sum fáur. Í 1001 nátt klárar hon at rúnarbinda kongin við sínum fantastisku søgum, sum hon, tá dagur rísur, so snildisliga brýtur av. tá spenningurin er í hæddini.

Í leikinum verða fleiri av teimum vælkendu eysturlendsku ævintýrunum dramatiseraði, m.a. Ali Baba, Sinbad Sjófarari og Prinsessa Parizade.

Leikurin er ein hugtakandi familiuleikur.

**Leikarar**: 8 leikarar (4 kvinnur og 4 menn - aldur er ikki so avgerandi)

**Pallmynd**: Hetta er ein einastandandi søga sum kann setast upp á pall uppá nógvar ymiskar mátar. Tað ber til at gera eina stóra og flotta uppsetan, og tað ber eisini til at gera uppsetanina sera einfalda - søgan sjálv er berandi.

**Leiktíð**: Umleið 2 tímar.

***Leikurin er skrásettur hjá MÁF.***